## Føroyingar fingu ikki sín vilja

**Bæði føroysku dómararnir og fólkið peikaði á Déjá Vu sum vinnara av Prix Føroyum, men útlendsku dómararnir vóru avgjørdir í, at Gestir skuldu vinna, og harvið varð tað**

DØMINGIN
*Eyðun Klakstein*

Nógv umtalaða dømingin stóð sína roynd í Prix Føroyar finaluni, og hóast nógv hevði verið tosað um, hvørt fólk kring landið skuldu fáa ávirkan á úrslitið, so broyttu hyggjaraatkvøðurnar ikki dómin hjá dómarunum.

Fólkið fekk nevniliga ikki sín vilja, tá ið tað peikaði á Déjá Vu sum vinnara. Teir gjørdust fimm stig ov stuttir í tøttu kappingini við Gestir.

Eisini teir føroysku dómararnir valdu Déjá Vu fram um Gestir, men tá ið teir útlendsku dómararnir vóru so sannførdir um, at Gestir vóru bestir, so endaði eysturoyarbólkurin eisini sum vinnari.

### Ein dómari á muni

Kappingin um sigurin var so tøtt, at tað var bara ein dómari á muni millum Déjá Vu og Gestir.

Tað vil siga, at hevði bara ein av teimum 28 dómarunum dømt fyri Déja Vu heldur enn Gestir ella Makrel, so hevði havnabólkurin staðið eftir sum vinnari.

Men alt tað er og verður hypotetiskt prát, tí fakta er nú, at fimti vinnarin av Prix Føroyum gjørdist Gestir.

Makrel, sum eisini kom víðari til endaligu dømingina, kláraði als ikki at standa mát við hinar bólkarnar og fekk 100 stig færri enn hinir báðir bólkarnir.

# Gestir vóru bestir

**Gestir leitaðu út í tað nýggja og óvissa, og teir komu heimaftur við sigrinum í Prix Føroyum 2003. Útlendsku dómararnir vóru bergtiknir av bólkinum, sum nú hevur nógvar spennandi uppgávur fyri framman**

FINALAN
*Eyðun Klakstein*

Gestir komu á vitjan í Prix Føroyum 2003, og teir fóru avstað aftur við tí stóra posanum við vinningum.

Festivalur í Danmark, spælistaðið Vega, Listastevnan og Lundgaard Studio stóð skrivað á hørðu pakkarnar, og bólkurin hevur nú nógvar spennandi uppgávur fyri framman.

– Vit eru, sum vit eru, og soleiðis verða vit eisini til finaluna, proklameraði ljómborðsspælarin í bólkinum undan finaluni.

Og Gestir vóru, sum teir plaga at vera.

Teirra álvarsama og næstan friðarliga image hevur dýpd og innihald, og tá ið sangarin Ólavur Hansen stendur mitt á pallinum og syngur við síni sermerktu rødd, og tann væl spældi tónleikur flýtur saman við honum, er veruliga talan um ein sermerktan bólk, sum leitar eftir nøkrum nýggjum.

Gestirnir til Prixið vóru bergtiknir av Gestum, og tað gjørdi eisini, at bólkurin endaði ovast á stigatalvuni.

### Verðin druknaði

Gestir spældu somu sangir, sum teir hava spælt gjøgnum alla kappingina, og tá ið verðin enn einaferð druknaði, fleyt bólkurin omaná.

Úttrykkið hjá Gestum er sterstakt, og teir hava nógvar stemningar í sínum sangum. Teir leita út í tað óvissa fyri at finna eitthvørt nýtt, og tað eydnast.

Eitt minus er, at tað er trupult at skilja orðini, sum Ólavur syngur, men tað gloymir tú næstan, tá ið tú sært hendan framúrskarandi frontfigurin gera alt annað enn veipa við ørmunum.

### Framúr poppur

Déjá Vu er vorðin ein frálíkur bólkur, sum spælir góðan og melodiøsan popptónleik. Teir báðir sangararnir í bólkinum, Flóvin og Líggjas, eru sera góðir, og serliga næsti sangurin hjá bólkinum, sum Flóvin sang, var framúrskarandi góður og fangandi.

Déjá Vu hevur eitt rættiliga friðarligt konsept, og tí høvdu teir ongar trupulleikar av, at fólk vóru deydlig meginpartin av kvøldinum. Teirra tónleikur hevði nakrar dygdir, sum ikki hevði fyri neyðina pallkaving ella hoppandi ungfólk.

Tað var inniligt og flott, tá ið bólkurin sínar sangir, og her var talan um mest melodiøsa partin av kvøldinum.

Bólkurin varð eisini løntur við einum plássi á festivalinum í Jelling, sum teir fegnaðust stórliga um.

### Ljóðaði illa eina løtu

Hatespeech hevði fingið heiðurin at leggja fyri hetta kvøldið, men skuldi ein konsertfyrireikari gjørt skránna fyri kvøldið, so hevði Hatespeech helst ligið í hinum endanum av kvøldinum, soleiðis sum teir gjørdu í innleiðandi umfarinum.

Hatespeech livdi als ikki upp til framførsluna, sum teir høvdu í undankappingini, tá ið alt fór upp frá, og fólk vóru fullkomiliga tikin av fótum.

Men tað var eisini trupult at endurtaka hesa framførslu, og nú Prixið er av, kann tað bara staðfestast, at besta framførslan í Prixnum 2003 var tann hjá Hatespeech í Fuglafirði.

Nógv var gjørt burtur úr ljóðinum í salinum, nú finalan skuldi verða, men byrjanin var meira enn hálvvánalig. Fyrsti sangurin hjá Hatespeech ljóðaði beinleiðis illa, men tað gjørdist betur, tá ið teir vóru komnir í gongd.

Í Fuglafirði var óført lív í, tá ið trash-rockararnir spældu, men hesaferð var tað meira ella minni sterilt, og tað var avgjørt ikki ein fyrimunur fyri Hatespeech.

### Bít meg

Fyrireikingin hjá MC Hár til finaluna var eitt sindur órógvað av, at tveir av limunum í bólkinum fóru burturúr, men tá ið bólkurin stóð á pallinum í Norðurlandahúsinum vóru teir so væl fyri sum sjáldan áður.

Teir báðir sangarnir, Eyðun Ásason og Rókur Jakobsen, høvdu ein sentralan leiklut, og saman við rapparanum Niels Una Dam, sum hesaferð var farin frá klassiskari Mona Lisa-útsjónd og hálva leið í nánd av Dalai Lama, settu teir futt í.

Tónleikurin hjá MC Hár er ein góð blanding av rappi og sangi, og okkurt av niðurløgunum eru sera fangandi.

– Bít meg, klíp meg.

Jú, tað er framvegis eitt sindur av broddi í yrkingunum hjá bólkinum, sum langt síðani hevur gjørt tað til sítt vørumerki at arga og elska.

Trupulleikin hjá MC Hár eins væl og Hatespeech var, at bólkurn livir av at fáa lív í, at fáa alt upp á kók og so tveita trumfin við góðum tónleiki. Men hesaferð var einki publikum, sum lata seg øsa.

### Spiltu fyrstu løtuna burtur

Gospelbólkurn Braquet, sum spældi tann mest klassiska rockin til finaluna, kláraði heldur ikki at fáa lív í.

Bólkurin var við í tí nógv umrødda umfarinum, tá ið Krit snávaði, og tað vóru mong sum hildu, at teir høvdu ongan kjans at vinna finaluna.

Soleiðis gjørdist tað eisini.

Víst vísti Arni Zachariasen kynstur sum gittarspælari, men tónleikurin var ikki nógv avbjóðandi, frekur ella leitandi, at dómararnir vildu senda teir víðari í kappingini einaferð afturat.

Braquet legði fyri við eini gittarsolo hjá Arna. Og hóast hon var teknisk krevjandi, so tóktist hendan byrjan eitt sindur kiksað, og bólkurin spilti í grundini fyrstu løtuna burtur. Ikki fyrr enn teir fóru at syngja og spæla sangir saman, gjørdist tað frægari.

### Makrel stinkar

Heavy-bólkurin Makrel skuldi seta punktum, og tað gjørdu teir við tungum rocktónleiki, har teir eisini nýttu øðrvísi ljóð saman við skitnum gittarum og buldrandi trummum.

Sangarin í bólkinum, Ári Rouch, gjørdi eisini um seg við fløtum havna-humori, og hvørt tað tænti nøkrum endamáli hjá bólkinum, skulu vit ikki gera okkum klók uppá.

Bólkurin kemur út við nýggjari fløgu í dag, og framførslan leygarkvøldið varð eisini nýtt at gera vart við hesa fløgu, og tað tóktist eitt sindur við síðuna av, nú talan var um finaluna í Prix Føroyum.

Gittarspælarin Rasmus Rasmussen vísti enn einaferð góðar dygdir sum tann sentrali tónleikarin í bólkinum, og Ári Rouch hevði sum sangari – tað vil siga tær løturnar, hann ikki var skemtari – stóra útstráling, og hann var avgjørt við til at senda bólkin víðari í kappingini.

Í endaligu dømingini stóð Makrel ikki mát við hinar bólkarnar, men tað var sjálvsagt tí, at tá vórðu dómararnir pískaðir til at velja ein bólk, og so vórðu Gestir og Déjá Vu tiknir fram um Makrel.

### Tøtt kapping

Dómararnir skuldu velja tríggjar bólkar av teimum seks, sum skuldu við til endaligu dømingina, og her fall valið á Déjá Vu, Gestir og Makrel.

Fólkið slapp eisini at atkvøða, og kappingin gjørdist sera tøtt, tá ið samanumkom.

Bert fimm stig vóru á muni millum Gestir og Déjá Vu, og høvdu útlendsku dómararnir ikki verið so sannførdir um, hvønn bólk teir skuldu atkvøða fyri, so høvdu føroysku dómararnir og fólkið kanska fingið sín vilja.

Men eingin ivi var um, at Gestir var ein verdugur vinnari av Prixnum hesaferð.

Tað vóru 28 bólkar, væl yvir 100 tónleikar, men eftir stóðu fimm eysturoyingar sum vinnarar.

Gestir vóru bestir!



*Ári Rouch, sangari í Makrel, royndi seg sum skemtari, men hevði betri eydnu sum sangari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Tá ið verðin enn einaferð druknaði, flutu Gestir omaná, og við tí framúr góða frontmanninum Ólavi Hansen á odda vunnu teir Prix Føroyar 2003*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Soleiðis atkvøddu tey

| | Déjá Vu | Gestir | Makrel |
|---|---|---|---|
| Fólkið | 48 | 34 | 18 |
| Útlendsku dómararnir | 25 | 69 | 6 |
| Føroysku dómararnir | 58 | 33 | 8 |
| Samanlagt | 131 | 136 | 32 |

## Jelling vil hava meira føroyskt

**– Tað er í grundini fantastiskt, at føroyingar hava nógv so nógvan góðan tónleik at bjóða, sigur leiðarin fyri Jelling Festivalin**

JELLING
*Eyðun Klakstein*

– Déjá Vu hevði eina góða framførslu. Teir spældu væl og høvdu nøkur løg við stórum potentiali, sum passa væl til Jelling, sigur Charlie Mortensen, sum er leiðari fyri festivalin.

Seinast sendu teir boð eftir Týr, men hesaferð verður tað ein meira friðarligur bólkur, sum skal umboða Føroyar.

– Tað vóru fleiri góðir bólkar við í finaluni, og vit kundu havt valt onkran annan, men Déjá Vu var tann bólkurin, sum segði mær mest, og tí fall valið á teir.

### Tættari hesaferð

Útlendsku dómararnir vóru rímiliga samdir um, at Gestir vóru besti bólkurin í finaluni, men Jelling vildi alíkavæl hava Déjá Vu.

– Dómararnir hildu, at Gestir vóru originalir í tí, sum teir gjørdu, men eg skilti eisini á teimum, at teimum dámdi sera væl Déjá Vu eisini. Tað var í fínasta lagi, at Gestir vann, men tað var jú ein tøtt kapping, sigur Charlie Mortensen.

– Hesaferð var kappingin javnari, enn hon var fyri tveimum árum síðani. Tá skaraði Clickhaze framúr, og eingin ivi var um vinnaran, hóast vit tá vildu hava Týr at spæla hjá okkum.

### Føroyskt vælkomið

Chalie Mortensen heldur, at tað hendir sera nógv í føroyskum tónleiki.

– Eitt er, at vit upplivdu eina sera góða finalu í Prixnum, men harafturat hoyrdu vit eisini trý sera góð nøvn í Mentanarhúsinum í Fuglafirði fríggjakvøldið. Tað er í grundini fantastiskt, at føroyingar hava nógv so nógvan góðan tónleik at bjóða.

Tey trý nøvnini, sum sungu til pallborðsfundin í Fuglafirði, vóru Lena & Niclas, Brandur Enni og All That Rain.

– Vit í Jelling vilja fegin arbeiða fyri, at vit hava onkran føroyskan bólk at bjóða hvørt ár. Eisini tey árini, tá ið Prix Føroyar ikki verður hildið, sigur Charlie Mortensen.



*– Vit í Jelling vilja fegin arbeiða fyri, at vit hava onkran føroyskan bólk at bjóða hvørt ár. Eisini tey árini, tá ið Prix Føroyar ikki verður hildið, sigur Charlie Mortensen, leiðari fyri Jelling Festivalin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*